Geysir Petroleum



Hunting Faroese Elephants

www.geysirpetroleum.is




Njótið eitt vikuskifti ella eina heila viku í hesum sera áhugaverda býi, sum hevur "alt" at bjóða.



**Sidney Hotel*****
við Victoria

3 nætur fyri hvønn í dupultkamari.
Eykanátt kr. 399,-
Eyka fyri einakamar pr. nátt kr. 200,-

**3.808,-**



**Hotel Americana*****
Baker Street

3 nætur fyri hvønn í dupultkamari.
Eykanátt kr. 351,-
Eyka fyri einakamar pr. nátt kr. 316,-

**3.663,-**



**Hyde Hotel*****
Paddington

3 nætur fyri hvønn í fýramans kamari.
Eykanátt kr. 321,-

**3.572,-**

Íroknað prísin er flogferð, gisting, morgunmatur og øll avgjøld.
Fá nærri at vita á 34 10 10 – ella á www.atlantic.fo

www.sansir.fo

ATLANTIC AIRWAYS

Atlantic Airways ger tað stuttligari at liva í Føroyum | www.atlantic.fo



TIL SØLU:

# Hugnalig sethús

við vøkrum urtagarði í Kálvagerði 4, úti á Fløtum í Tórshavn

**HÚSINI:**
Húsini eru sera snøgg og væl røkt.

**Uttan:** svartur timburklædningur, blá sprossavindeygu og flagtak.

**Innan:** Trip Trap ljós, lútaði, massiv trægólv, lútaði ljós træloft, massivar træhurðar, hvítur Uno Form køkur, góð og rúmlig skáp í sovirúmum og í vaskirúmi, luftventilatiónsskipan er í húsunum.

Í húsunum eru 3 sovirúm + 1 hjúnarrúm við egnum baðirúmi, stórt felags baðirúm, rúmligur køkur, rúmligt vaski/fýrrúm, 2 stovur – onnur við útgongd til hátún.

Húsini eru í einari hædd, 150 m², grundøkið 535 m², tey eru bygd í 1985.

Pláss er inni á stykkinum til 2 bilar, klárt at gera bilskýli.

**URTAGARÐURIN:**
Uttanfyri er alt gjørt av serkønum fólki, flísalagdar gøtur, hugnaligir krókar, steinbed, nógvir runnar og trø, lítil grasvøllur.

**ØKIÐ:**
Húsini liggja í veðurgóðum og barnavinarligum umhvørvi úti á Fløtum. Her er stutt til barnagarðar (í Øksnagerði, við Landavegin, við Velbastaðvegin), Venjingarskúlan, matvøruhandil og bakara. Bussambandið er gott. Teinurin oman í býin tekur um 15 min. at ganga. Tað er frítt kring húsini og fríøki liggur beint frammanfyri.

Húsini verða seld, um hóskandi boð fæst. Áhugað verða biðin um at seta seg í samband við Advokatvirkið - tlf. 312227, tlf. 225045.

Advokatvirkið

Páll Nielsen, adv. | Eyðhild Skaalum, adv.
Sigmund Poulsen, adv. | Hans Trygvi Teirin, adv.

Skansavegur 1 • Postsmoga 85 • FO-110 Tórshavn
Tlf. 312171 • Fax 315874 • e-mail: advokat@post.olivant.fo

# Tveir kingosangarar til Aasiaat í Grønlandi

KONSERT

Tann 19.juni fara teir báðir, Petur Jacob Eliasen og Niels Midjord, til Aasiaat at hava 2 konsertir við kingoløgum, sungin á vanligan hátt og meira nýmótans líki við útseting fyri gittara og sang.

Tann fyrra framførslan verður hóskvøldið 22. juni kl. 19.30, í kirkjuni í Aasiaat, og tann seinna verður á bygd í Aasiaat økinum 23. juni. Hartil kann nevnast at grønlendingar halda tjóðardag 21. juni.

Sum eina upphiting til longu ferðina fara Petur Jacob Eliasen og Niels Midjord at syngja føroyskar Kingosálmar, við og uttan fylgispæli.

Hóskvøldið 15. juni kl. 20.00 hava teir báðir konsert í Kistianskirkjuni í Klaksvík.

Fríggjakvøldið 16. juni kl. 20.00, verður konsert í Sandoynni.

Høvuðsstuðul og fyriskipari av túrinum er Norðurlandahúsið í Føroyum.

# Langur leygardagur á Sandoynni

HANDILSLÍV

**SANDOY:** Nú fara sandoyingar aftur at royna seg við longum leygardegi. Hesaferð verður hann 17. juni. Nærum allir handlar, kioskir, ein kafé og ein hárfríðkan eru við í tiltakinum. Flestu handlar hava opið til kl. 17.00. Men tað eru summi, ið sum vanligt hava opið longri, og tað hava tey so eisini hendan leygardagin. Kioskir og Cafe´in hava somuleiðis opið longri. Handlarnir fara at spenna seg út við ymiskum góðum tilboðum, sum lýst verður við seinni.

Langur leygardagur er ein táttur, sum ikki fyrr er so nógv nýttur í oynni, men nú hava tey tikið táttin upp eitt sindur oftari. Kanska tað dregur eitt sindur av ferðandi til oynna. Hendan sama dag letur Listasavnið á Steinboga á Sandi upp fyri fyrstu ferð.



## Flaggskrýddur lortur

Mikudagin kom myndamaður okkara fram á nakrar flaggskrýddar hundalortar á Heygsbreyt í Havn.

Um hundurin hevur føðingardag ella hevur ein tjóðskaparsinnaðan eigara, sigur søgan einki um, men eigarin kundi passandi farið oman á býráðið eftir undalortaposum…